# HEILSANIR



**Til Beintu**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 21. juli. Góðan túr í Suðri.
**Heilsan lítlasysti**



**Góði Fróði**
Hjartaliga til lukku við 26 ára degnum. Takk fyri mangar góðar kaffimunnar og vitjanir. Vit fara at sakna teg, tá tú fert til Danmarkar.
**Heilsan vit øll á Víkavegi 85**



**Góði Fróði**
Nógv góð "ball" hava vit verið í saman. Hjartaliga til lukku við degnum. Vit gleða okkum til ballið.
**Heilsan Gita hvør**



**Góði Fróði**
Hjartaliga til lukku við 26 ára degnum. Hendan dagin var lagið gott, men standurin kundi verið betri… hehe. Alt tað besta framyvir og góðan túr niður
**Ynskja vit á Selheygsgøtu 1**



**Góði Johnny pápabeiggi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 22. juli og við FM-heitinum.
**Bestu heilsur Artan**



Hjartaliga takka vit øllum sum á ymiskan hátt gleddu meg og foreldur míni á fermingardegnum 13. apríl 2003.
**Kærar heilsur Ingibjørg**

**Góði Fróði**
Ja, vónandi verður tú her at feira komandi ár saman við okkum. Hjartaliga til lukku við 26 ára degnum. Túsund takk fyri, at eg eigi ein so góðan vin, sum tú ert.
**Heilsan Anita**



**Góði Fróði gubbi**
Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við føðingardegnum. Takk fyri alt, tú ert fyri okkum. Vit fara at leingjast eftir tær.
**Heilsan Petur Martin og Kristian**





**Góði Rógvi**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 20. juli. Vit elska teg, muss og klemm.
**Heilsan mamma, babba, stóribeiggi og lítlasysti**



**Góði mammuba Gardar**
Hjartalita tillukku við føðingardegnum, sum var tann 21. juli. Nú nærkast til piparbússan stendur í túninum. Muss oig klemm frá
**Filip, Levi og Jóhannes**



**Góði lítlibeiggi Jóhannes**
Lukku og gleði á tínum 2 ára degi tann 22. juli við ynski um at tú og Levi hava ein góðan dag. Mussar og klem
**Stóribeiggi og Filip og Levi**



**Takk fyri stuðulin**
Tvøroyrar Svimjifelag takkar við hesum hjartaliga fyri tann dygga stuðul, vit fingu fyri teimum tiltøkum, vit skipaðu fyri á Jòansøku. Gott summar øll somul.
**Tvøroyrar Svimjifelag**



**Til mammu**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Takk fyri at alt tú ert fyri okkum.
**Heilsan Bárður, Rógvi, Rósa og babba**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20,00 er bønarmøti.
www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking.
Evni: Jesus – virðiligari og betri.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00: Hámessa v/ Jude Kulas í Mariukirkjuni.
Aftaná verður kirkjukaffi.
Ólavsøkuaftan kl. 7.30: Messa
Ólavsøkudag kl. 10.00: Messa v/ Kjeld Pollestad í Mariukirkjuni

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
www.rhema.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Fríggjavøldið kl. 20.00: Café kvøld, ymiskt er á skránni.
Leygardagin kl. 17.00: Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Sonni Poulsen talar.
Leygarkvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Mikukvøldið kl. 20.00: Húsmøti hjá Vivi og Jóhannes Hammer í Kollafirði.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ teimum ungu.
Ólavsøkuaftan kl. 18.00: Møti v/ Pól Johannesen. Kvinnukórið syngur. Kl. 23.00–04.00: Opið hús við café, lovsangi og andakt – øll eru vælkomin.
Ólavsøkudag kl. 18.00: Møti v/ Regin Høgnesen. Meinigheitskórið syngur.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20.00: Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Mikukvøldið kl. 21.00: Útimøti á Torginum. Opið hús í Saron aftaná.
Telefonandaktin 424741

**Samkoman Lívdin**
Ongi møtir verða 27. juli og 3. aug.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Siloa, Fuglafjørður**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Kristian Hansen talar. Evni: Royndir og líðingar (Rómbr. 5:1-11). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Felags húsmøti verður mikudagin kl.20.00 hjá Charles og Anthony í Saltangará.

**Keldan, Skálafirði**
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl.20.00 er bønarmøti
Sunnudagin kl.11.00 er møti við Kaj Meinar og Fríðbjørg Michaelsen (barnaansing er undir møtinum).
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
www.kuff.fo

**Betania, Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20.00: Bíbliutími.
Øll eru vælkomin.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánakvøld kl. 21: Bønarmøti.
Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Matiné í Havnar kirkju**
Leygardagin 26. juli kl. 11.30 verður matiné. Kórið »Sólarmagn« av Velbastað, ið verður stjórnað av Fróða Sandoy, syngur fjølbroytta skrá.

**Fiska- og sølutorg í Runavíkar kommunu**
Aftur í ár ætla Runavíkar kommuna og Kunningarstovan í Saltangará at skipa fyri einum fiska- og sølutorgi á gøtuni. Um viðrar, verður tað leygardagin 2. aug. 2003 Handlar, feløg og onnur, ið hava hug at verða við, verða biðin um at ringja til Kunningarstovuna í Saltangará, tlf. 449 449, áðrenn 23. juli 2003.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
Á ólavsøku verður fotoframsýning av útoyggjamyndum í kjallaranum í Tilhaldinum hjá Hjalmari Waag Høgnesen.
Á miðhæddini verður møguleiki at fáa sær ein drekkamunn og okkurt heimabakað.
Tilhaldið hevur átikið sær at hava móttøkuhúsið opið á ólavsøku.
Opið verður 28.-29. juli kl. 15-19.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.30
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Javni**
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí.* Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,

**Ráðgeving um heilaskaðar**
Hevur tú fingið ein heilaskaða, ert avvarðandi ella arbeðir við fólki við heilaskaða og hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi ella annað, so ert tú vælkomin at venda tær til okkara.
NeuroCom, 450 Oyrarbakki
Tlf. 422 763 ella Fartlf.: 225 263
Teldupostur: info@heilsu.info
www.heilsu.info
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897, e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
MBF skrivstovan verður stongd frá mánadegi 14. juli til 10. august.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.

**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:** Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

# BRÚDLEYP

Leygardagin 26. juli kl. 15.00 giftast úti í Grøv í Klaksvík Anja Isaksen og Bogi Laksáfoss. Vælkomst verður í Skálanum kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin. Um ikki viðrar, verður vígslan í Betesda.

Leygardagin 26. juli kl. 16.00 giftast í Fuglafirði Magda Lambaa, Fuglafirði, og Birol Altinok, Odense. Tey, ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið, eru vælkomin í Felagslonina í Fuglafirði kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 2. august giftast Annika Midjord, Argir, og Jacob Trans, Keypmannahavn. Vígslan verður kl. 15.00 í samkomuni Immanuel, Brekkutún 3, Hoyvík, og veitslan verður fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 18.00.

Leygardagin 9. august kl. 13.30 giftast í Kúrdali, Sunva Eysturoy og Poul Jens Lassen. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 17.30. Vælkomst verður kl. 21.30. Hava tit hug at halda kvøldið saman við okkum, eru tit hjartaliga vælkomin! Freistin at tekna seg er fríggjadagin 25. juli á tlf. 313860 ella 456465. Um ikki viðrar verður vígslan í Ebenezer.


HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Frumsýning
Mikudagin 23.07.kl. $23^{00}$
Hósdagin 24.07.kl. $23^{00}$




Mikudagin 23.07.kl. $18^{30}$
Mikudagin 23.07.kl. $22^{30}$
Hósdagin 24.07.kl. $18^{30}$
Hósdagin 24.07.kl. $22^{30}$




Mikudagin 23.07.kl. $19^{30}$
Hósdagin 24.07.kl. $19^{30}$




Mikudagin 23.07.kl. $20^{30}$
Hósdagin 24.07.kl. $20^{30}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu